VINIR LOVA IKKI VINUM AT KOYRA SKÍT.

Fyrisitingarstjóri til Tórshavnar kommunu

www.torshavn.fo

Tórshavnar kommuna søkir nýggjan fyrisitingarstjóra, nú fyrisitingarstjórin seinastu 8 árini er farin í annað starv.

Fyrisitingarstjórin mannar stjórnarbólkin saman við borgarstjóranum, kommunustjóranum, tekniska stjóranum og trivnaðarstjóranum. Fyrisitingarstjórin hevur ábyrgdina av fíggjarøkinum, kt-økinum, starvsfólkaøkinum og borgaratænastuøkinum (Snarskivuni).

HØVUÐSUPPGÁVUR

- Menna miðfyrisitingina sum eitt gott og virkið arbeiðspláss við týðiligum virðum og greiðum málum
- Tryggja, at leiðslubólkurin á miðfyrisitingarøkinum virkar sum ein savnað, samskipandi og strategiskt hugsandi eind
- Tryggja, at miðfyrisitingin veitir politisku skipanini professionella og fakliga ráðgeving
- Tryggja, at miðfyrisitingin er før fyri at veita øllum borgarum og vinnulívi í kommununi eina dygdargóða tænastu
- Saman við hinum stjórnarlimunum tryggja, at kommunan hevur fullgóða fíggjarstýring og fremur úrslit
- Saman við hinum stjórnarlimunum fyrireika og menna kommununa fakliga og fíggjarliga, soleiðis at hon kann taka við teimum avbjóðingum og uppgávum, sum í framtíðini verða lagdar kommununum at umsita

FØRLEIKAKRØV

Umsøkjarar til starvið verða mettir eftir fakligum, leiðsluligum og persónligum førleikum. Umráðandi er, at tú:

- hevur kandidatútbúgving frá hægri lærustovni, ella tilsamans hevur sambærligt útbúgvingarstøði og royndir
- hevur kunnleika til og royndir frá leiðslu, fíggjarstýring og fyrisiting
- hevur góð leiðslu- og samstarvsevni, umframt mennandi leiðslustíl
- hevur gott strategiskt skil
- dugir at seta greið mál og skapa úrslit
- dugir væl at raðfesta, samskipa og útdelegera
- hevur góðar samskiftisførleikar, bæði munnliga og skrivliga
- dugir væl føroyska málið í skrivt og talu
- megnar til tíðir at arbeiða undir stórum trýsti

Tann, ið sett/-ur verður skal hava kunnleika til kommununa og kommunal viðurskifti og innlit í samfelagsviðurskiftini í Føroyum í breiðum høpi.

Nærri greining av starvinum sæst í starvsprofilinum á www.torshavn.fo.

LØN OG SETANARTREYTIR

Starvið sum fyrisitingarstjóri er flokkað sum tænastumannastarv í 38. flokki, har mánaðarlønin íroknað viðbót er 49.191,18 kr. umframt 15 % í eftirløn sum tænastumaður. Setanin er við tvey ára royndartíð.

MEIRA AT VITA

Ynskir tú fleiri upplýsingar um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Ingibjørg Berg, kommunustjóra, á tel 302010 ella við t-posti ingibjorg@torshavn.fo.

UMSÓKN

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, lívsgongdarlýsing og møguligar tilvísingar skulu sendast til:

Tórshavnar kommunu
Att.: Ingibjørg Berg
Vaglið
FO-100 Tórshavn
Viðmerk á umsóknina: "Fyrisitingarstjóri"

Umsókn til starvið skulu vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi mikudagin 2. januar 2013 kl. 12.00.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA ER STØRSTA KOMMUNA Í FØROYUM. Við árslok 2011 vóru 19.811 íbúgvar í kommununi. Tórshavnar kommuna er sera fjølbroytt, frá framkomna býnum til meira siðbundið bygdarlív í smáum bygdum. Eitt fjølbroytni, ið vit virðismeta. Visjónin hjá Tórshavnar kommunu er at vera ein veruligur kappingarneyti hjá øðrum stórbýum, soleiðis at fólkið, sum her býr, støðast og ynskir at verða verandi, og soleiðis at eisini onnur fólk og vinnulív velja at seta búgv í Tórshavnar kommunu. Hjá Tórshavnar kommunu starvast í dag umleið 1500 fólk. 140 fólk eru í kommunalu fyrisitingini, og hini starvsfólkini arbeiða á ymsu stovnunum hjá kommununi. Kommunala fyrisitingin er miðsavnað í miðbýnum í Tórshavn.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

www.sansi.fo